


# Bora nú leitibrunnin Butch West

**Jan Müller**

02.06.2014 - 08:25

Oljan.fo

Faroe Petroleum boðar frá, at nú er byrjað at bora Butch South West leitibrunnin, sumføroyska felagið eigur 15 prosent av. Butch South West brunnurin liggur tætt við Butch fundið, sum varð funnið í 2011 í norska partinum av Norðsjónum.

Havdýpið, har borað verður, er umleið 65 metrar, og brunnurin liggur skamt frá týðandi undirstøðukervi, nær við framleiðslueindirnar Ula, Tambar og Gyda.

Tað týðandi Butch fundið (Faroe 15 prosent) hevur lætta olju og sera góða jarðgoymslu. Butch South West brunnurin er ein sjálvstøðugur strukturur, tvs. at hann er hvørki tengdur at Butch East brunninum, sum var turrur (sí tíðindaskriv 12. mai 2014) ella Butch fundinum frá 2011.

Fyristøðufelagið arbeiðir við eini útbyggingarætlan fyri Butch fundið samstundis sum Butch South West verður boraður. Um Butch South West verður eitt fund, kann

útbyggingin møguliga gerast ein sjálvstøðug framleiðslueind, heldur enn at verða knýtt í verandi undirstøðukervi.

Centrica er fyristøðufelag (40%) og nýtir Mærsk Giant boripallin til boringina. Hini oljufeløgini eru Suncor Norge (30%) og Tullow Oil Norge (15%).

Graham Stewart, forstjóri sigur í viðmerking, at um Butch South West verður eitt fund, fer tað at leggja týðandi tilfeingi og virði at Butch fundinum. Felagið fer í næstum at boða frá úrslitinum av boringini á Bue leitimiðinum (Faroe 25%) í Norskahavinum, sum er tætt uppat av tí týðandi Pil fundinum, sum varð kunngjørt herfyri.